Harðgreip(a)

Eivind Weyhe
Lauritsargøta 10, FO-100 Tórshavn. Email: eivindw@setur.fo

Úrtak

Í greinini verður vískt á at eitt navnorð *harðgreip(a)* kv. kemur fyri í trimum føroyskum staðarnøvnum, men í ymiskum líki. Í einum føri er *Halgreip* navn á bøstykki, í øðrum føri er *Harðgreipa* navn á innløgdum traðarstykki, og í tí triðja førinum er fleirtalsformurin *Harðgreipur* (ella *Harðgreipir*) navn á trimum homrum úti í haganum. Høvundurin setur navnið í samband við norrønt *harðgreipr* adj. 'harðhentur' (í viðurnevnum og jatna- og gívranøvnum) og líknandi navnorð í øðrum norðurlandamálum. Roynt verður at gjøtla um hvør týdningurin kann hava verið í føroyskum, og hildið verður at navnagávan kann sipa til truplar umstøður til velting og ferðslu.

Abstract

The article directs attention to the noun *harðgreip*(*a*) f., which appears in three Faroese place-names, though in different guises. In the one case we find *Halgreip* as the name given to a piece of cultivated infield, in the second *Harðgreipa* is the designation of a strip from the outfield, fenced in for cultivation, while in the third the plural form *Harðgreipur* (or *Harðgreipir*) is applied to three rocky slopes in the outfield. The author connects the name with the ON adjective *harðgreipr* 'hard-handed, heavy handed' (found in bynames, and in appellations of giants and giantesses), and with nouns of similar import in other Scandinavian languages. Conjecture is offered about what led to the adoption of such a name in the Faroes, and it is suggested it may have referred to difficulties in cultivating the land or travelling across it.

Inngangur: trý staðarnøvn

Í hesari grein verður roynt at varpa ljós á trý heldur sjáldsom staðarnøvn sum koma fyri í trimum plássum í landinum, Ørðavík, Tjørnuvík og Bø. Roynt verður at vísa á at øll trý nøvnini av fyrstan tíð hava innihildið tað sama orðið tó at tey í dag vísa seg í eitt sindur skiftandi líki. Plássini har nøvnini koma fyri, eru heldur ikki serliga lík, tí í einum føri er tað í tí gamla bønum, í øðrum føri eitt innlagt traðarstykki og í tí triðja førinum hamrar úti í haganum burtur frá bygdum øki.

Orðið kemur eisini fyri uttan fyri Føroyar, báði í staðarnøvnum og sum felagsheiti (appellativ), og í norrønum sum viðurnevni og sum jatna- og gívranavn.

Harðgreipur í Ørðavík

Á einum av teimum sonevndu máliborðsbløðunum, *Føroyar 1:20.000* (1997), er eitt staðarnavn skrivað *Harðgreipur*. Tað er navn á trimum homrum innast í Dalshaga í Ørðavík, tætt við markið til Rók-



1. mynd. *Harðgreipur* í Ørðavík.

haga í Fámjin. Tann niðasti hamarin er í umleið 270 metra hædd og tann ovasti í 320 metra hædd yvir sjóvarmálanum. Stutt sunnanfyri er Valdaskarð, og bygdagøtan úr Fámjin til Trøngisvágs fer um skarðið og so norður undir Harðgreipum og sneiðir upp ígjøgnum teir niðastu hamrarnar (1. mynd). Úr Ørðavík síggjast hamrarnir væl innast í dalinum.

Í 1953 skrivaði Napoleon Djurhuus navnið upp í sínari staðarnavnainnsavning fyri Det danske Stednavneudvalg og hevði Daniel Jacob Mortensen, bónda í Ørðavík, sum heimildarmann. Í fyrsta umfari skrivar hann *Harðgreipir*, men í tí endaliga listanum rættar hann endingina til *-ur*, og sum viðmerking skrivar hann "3 hamrar". Haraftrat hevur hann navnið *Rókin í Harðgreipum*. Millum teir tríggjar hamrarnar ið eru hvør yvir øðrum uppeftir, eru sjálvsagt tvær røkur. Heimildarmenn eg prátaði við í 1996, søgdu bara at røkur eru millum hamrarnar, men teir nevndu ikki hvør av teimum ið bar navnið *Rókin í Harðgreipum*, men helst er tað rókin millum báðar teir niðastu.

Sjálvt um staðið er í haganum hjá ørðvingum, so hava fámjiningar verið meinkunnigir har eisini. Tað er sum nevnt við markið millum hagan hjá ørðvingum og fámjiningum, og umframt at bygdagøtan hjá fámjiningum, tá ið teir skuldu norðureftir, hevur ligið tann vegin, so hava fámjiningar, tá ið teir róku í Rókhaga, rikið seyðin oman undir Harðgreipur og so suður og vestur um Valdaskarð.

Tá ið Jógvan Jacobsen, lærari í Fámjin, skrivar staðarnøvn í Fámjin upp fyri Det danske Stednavneudvalg í 1927, tekur hann eisini *Harðgreipur* við millum nøvnini í Fámjin, og hann lýsir staðið sum "En Kløft mellem 2 Stenafsatse". Tað er ikki heilt greitt hvussu orð hansara skulu skiljast.

Hvønn týdning *Harðgreipur* hava havt í hugaheiminum hjá fámjiningum, sæst í eini ritgerð sum fámjiningurin Jákup Pauli Nielsen skrivaði í 1990 til eina ritgerðarkapping hjá Fróðskaparsetrinum um bygdagøtur. Tá ið hann lýsir varðagøtuna til Trøngisvágs, sigur hann millum annað at hon gongur "undir Harðgreipum", onkustaðni umtalar hann staðið sum "tær trøls-

ligu Harðgreipur", og hann hevur onkrar frásagnir sum eru knýttar at hesum stað. Her eru tær:

> Ein dagin fyrst í hinari øldini sóu fámjiningar ein góðveðursmorgun teir fóru at reka, bygdamann sum burtur var blivin nakað frammanundan, ganga millum fremmandar menn, og teir mistu teir úr eygsjón tá ið hesir fóru niðan Harðgreipur, ið er upp norðan Valdaskarð. Har skal vera sera nógv íbygt.
>
> Fyrrapartin í hesari øldini vóru fleiri ungfólk – og við teimum ein tilkomin maður – á ferð til Tvøroyri. Tað var av besta summarveðri. Við gøtuna undir Harðgreipum lá har væl av gráari ull, sum sá út at vera løgd út at torna á tað stóra grótið. Tá ið onkur av teim helt at best var at taka ullina og hevði hana á hondum, kveistraði eldri maðurin tey til viks, at ullina skuldu tey ikki nema, tí tað var ikki nøkur lesull. Tá ið tey út mótur kvøldi komu aftur, var eingin ull at síggja.
>
> Har hendan varðagøtan fer úr Valdaskarði í Oyrnaskarð, verður nevnt *Millum Skarðnanna*. Mangar eru frásagnir um hvat fólk hava verið varug við av ovurnatúrligum um hesar leiðir, og serliga nærhendis Harðgreipum.
>
> Hesa gøtuna hava ættarliðini slitið upp gjøgnum ókendar øldir. Kundi verið at mong sporini eru niðan Harðgreipur at vitja hørg ella hargirnar har, norðan Valdaskarðið, eftir somu gøtu fram við Ørðafossi.
>
> Kundi hent seg at hesar hargir ella hørgin hava eyðkent lítlu víkina oman eysturfrá, Ørðavíkina.

Í endurgevingini her er stavsetingin normaliserað. Høvundurin skrivar *Hargreipur* (við ongum *ð*), og tað skilst at hann hevur hug at seta navnið í samband við *hørg* (flt. *hargir*) og harvið leggja onkun sakralan týdning í navnið (umframt at hann hevur hug at knýta *Ørðavíkar*-navnið upp í tolkingina).

Øll dømini vísa at navnið hevur fleirtalsform. Um tað hevur verið sterkt ella veikt bent, ber ikki til at siga; í suðuroyarmáli hoyrist ikki munur á *i* og *u* í ending, og tí hoyrist ikki um fleirtalsendingin er *-ir* ella *-ur* (sí formin hjá Napoleon Djurhuus). Tað gerst tí ikki av um tað er eintalsformurin *Harðgreip* ella *Harðgreipa* sum býr undir.

Harðgreipa í Tjørnuvík

Fara vit nú at kanna eftir um navnið man vera at finna aðrastaðni í landinum, ja so skulu vit norður til Tjørnuvíkar. Men har er tað brúkt sum jarðarnavn.

Ta elstu uppskriftina hevur Ulf Zachariasen gjørt fyri Staðanavnanevnd Føroya Løgtings í 1948, og har eitur staðið *Uppi í Harðgreipi* og stendur millum nøvn "Í bønum". Í viðmerking er sagt at tað er "heldur brattur teigur" (sum heimildarmaður til nøvnini er nevndur Dávur Emil Magnusen og til frágreiðingina Jens Pauli í Tjørnuvík). Ulf hevur við tølum merkt nøvnini á kort, tó ikki nøvnini innangarðs, so tað navnið er ikki komið við á kortið, men hann nevnir tað millum nøvn við hjáorðinum "uppi": *Uppi í Geil*, *Oman Klett*, *Uppi í Krók*, *Uppi í Harðgreipi* /hargroypi/, *Uppi í Ból* o.s.fr.

Napoleon Djurhuus hevur í 1956 skrivað ein lista við nøvnum í Tjørnuvík

fyri Det danske Stednavneudvalg. Hann byggir á listan hjá Ulf, men hevur eisini prátað við Zacharias Andreasen, bónda í Skemmuni. Navnið skrivar hann *Harðgreipini* við úttaluni /hargroybini/, men hann setur spurnartekin aftan fyri navnaformin. Sum viðmerking skrivar hann "bøstykki".

Í Taxatiónsprotokollini (1873) er hetta navnið skrivað *Hargreipa* (nr. 240) og sagt at vera trød innløgd av Heimankambshaga. Teir uppgivnu formarnir eru ikki heilt eintýddir, men tað kundi sætt út sum navnið hevur verið veikt bent kvennkynsorð í eintali. Serliga er tað formurin í Taxatiónini sum bendir á tað, og formurin hjá Ulf má tá lesast sum *Uppi í Harðgreipu* (*-u* og *-i* fellur saman í bygdamálunum norðast í Streymoynni, sbr. Weyhe 2014). Formurin hjá Napoleon kundi sætt út sum ein bundin hvørjumfalsformur, t.e. (uppi í) *Harðgreipuni*, men formliga kundi hann eisini verið bundið hvørkikyn í fleirtali.

Í staðarnavnaavmerking á heimasíðuni hjá Sunda kommunu (www.sunda.fo) er navnið skrivað *Hargreypan* og staðið lýst sum "Teigur". Sjálvur var eg og hugdi at staðnum tann 26. oktobur 2017 (2. mynd). Tað er eitt ikki serliga stórt stykki, bratt, men væl velt við einum trimum bríkum í. Tað er oman fyri geilina og liggur mestsum innikroyst millum ánna ið kemur oman úr Galtagjógv uttanfyri, geilina niðan- og frammanfyri og eitt hellusvað omanfyri, nevnt *Uppi í Svaðabrúnni*.[1] Av tí at tað, sum Taxatiónin 1873 sigur, er innløgd trød, hevur stykkið verið beint uttan fyri tann gamla bøgarðin og oman fyri geilina; navnið *Uppi í Krók*, sum er stutt frammanfyri, tykist sipa til krókin á tí gamla bøgarðinum. Tvíljóðið *ey* í hesari avmerkingini hjá kommununi er eitt sindur óvæntað, men kann hugsast at vera nýggjari misfatan; <ei> úttalast her norðuri sum /oi/ og fellur í úttalu saman við skrivað <oy> , sbr. úttaluna hjá Ulf Zachariasen og Napoleon Djurhuus. Sjálvur fekk eg navnið uppgivið sum /uppi í hargroypi/, sum eg velji at tolka sum *Uppi í Harðgreipu*.

Navnið kundi sætt út sum veikt kvennkynsorð, altso *Harðgreipa*, sbr. formin í Taxatiónini.

Halgreip í Bø

Men umframt hesar navnaformar úr Ørðavík/Fámjin og Tjørnuvík, við *Harð-* sum fyrra liði, finna vit formin *Halgreip* sum jarðarnavn í Bø vesturi í Vágum, og har er tað í tí gamla bønum.

Navnið finst í staðarnavnauppskriftum sum V. U. Hammershaimb gjørdi í 1853, og hann skrivar *Halgreip*. Í sama formi er tað nevnt í Taxatiónsprotokollini frá 1873 har tað er nevnt undir tveimum taxatiónsnumrum: báði (sum nr. 94) saman við jarðunum "Innanfyri keldu, Toftahús og Leingjan", sum til samans eru 1 mk og 6 gl, og einsamalt (sum nr. 96) sum 8 gl, og alt er tað kongsjørð. Í Skjøde- og Panteregister (í Føroya Landsskjalasavni) frá 1840'unum er skrivað "½ Greib" (!).

Í 1920'num skrivaði Mikkjal á Ryggi nøvn í Bø upp fyri Det danske Stednavneudvalg har hann báði hevur nøvnini *Halgreip* og *Halgreipafløttur*. Hann hevur eisini merkt tey á eitt hondteknað innangarðs-

[1] Oman fyri *Svaðabrúnna* eru traðir innlagdar seinri í tíðini sum nevnast *Svøðini* ella *Uppi á Svøðum*. Heimildarmaður mín var Steinbjørn Magnussen, Tjørnuvík.

2. mynd. *Harðgreipa* í Tjørnuvík.

kort (3. mynd). Eystan fyri Myllánna (Stórá) er øki sum á generalstabskortinum frá 1901 sær út sum heimrust (har m.a. *Tungugarðar* eru), og har eystanfyri er *Halgreip* teknað sum eitt reiðiliga stórt samanhangandi øki. Niðaneftir skilur ein geil tað frá einum øki omanfyri sum nevnist *Uppi á Trød*, og omaneftir er tað eisini skilt við eini geil frá *Hálvmørkini*, sum er niðanfyri. Inni á tí økinum sum er teknað sum *Halgreip*, hevur Mikkjal eisini merkt nøvnini *Halgreipafløttur*, *Kópafløttur*, *Uppi í Tungu*, og *Uppi í Beitinum*. Á kortinum hjá generalstabinum frá 1901 (sæst á www.kortal.fo) er tað eitt samanhangandi og týðiliga avmarkað øki, sum á kortinum hjá Mikkjali, og hús eru eingi á tí.

Ein listi sum Napoleon Djurhuus hevur gjørt í 1955, eisini fyri Det danske Stednavneudvalg, byggir á uppskriftirnar hjá Mikkjali á Ryggi, og sum viðmerking til *Halgreip* hevur Napoleon skrivað "jarðastykki, bratt, hellir nógv". Viðmerkingin vísir at forliðið hevur verið sett í samband við *hall* ('tað sum hellir').

Hetta økið er í dag mestsum avbygt. Jón Joensen, bóndi í Bø, sigur mær at *Uppi á Halgreip* var ógvuliga brattur bøur, ófantaligt stykki, har steinar stóðu uppúr, og har grót leyp niður úr fjallinum; har lógu tí grótrúgvur og stórir steinar, sum teir lótu liggja fyri at forða steinum sum lupu

3. mynd. Kut úr korti og navnalista hjá Mikkjali á Ryggi.



oman úr fjallinum, at koma longri oman. Serliga tann niðari parturin var ringur bøur meðan hann var betri uppi í Tungu (telefonsamrøða 30.10.2017).

Eftir Mikkjal á Ryggi finst ein lýsing av bygdini har hann skrivar um bøin at "hann er nakað torførur at arbeiða. (...) Tætt oman fyri bygdina eru 2 fjøll, Berinartindur og Hvilvtarnøva. Ofta loypur grót oman úr teimum og stiklar oman í bøin; stundum hevur tað komið nær at húsunum, og hent hevur, at tað hevur sorlað úthús" (Mikkjalsbók, s. 214 f.).

Her í Bø sær navnið út til at vera sterkt bent eintalsorð. Helst man tað eisini hava verið kvennkyn.

Tað má haldast fyri vist at tað er sama orðið vit hava sum navn her í Bø sum í Ørðavík og Tjørnuvík, og at formurin *Halgreip* í Bø er íkomin við at *r* (*rð*) er broytt til *l*. Tað er ikki óvanligt at *r(ð)* broytist til *l*, í hesum føri helst við ljóðfrálíking (dissimilatión) av *r-r* > *l-r*. Dømir um tílíka broyting í staðarnøvnum eru at síggja hjá Matras (1933: 49), so sum *Seyringaskarð* > *Seylingaskarð*, *Kyrjarheyggjur* > *Kyljarheyggjur*, *Svarðrók* > *Svalrók*; onnur dømir í føroyskum eru *kjørbreyt* > *kjølbreyt*, *riðsæri* > *(gongu)risali* (FO). Eisini kann tað hava styðjað upp undir broytingina *Harðgreip* > *Halgreip* (*Hallgreip*?) í Bø at fólk hava sett navnið í samband við *hall.*

Sernavn, men ikki felagsheiti í føroyskum

Harðgreip ella *Harðgreipa* ella okkurt sum líkist tí, tykist ikki vera kent sum livandi felagsheiti (appellativ) í føroyskum nútíðarmáli. Í orðasavninum á Føroyamálsdeildini er *harðgreip* nevnt á tveimum orðaseðlum. Ikki verður sagt hvat dømini á seðlunum sipa til, bara at annað kemur fyri í staðarnavni, og hvat týdningi viðvíkir, verður á báðum seðlum víst til fornnorrønt ella íslendskt. Ein stakur seðil er við *halgreip*, men seðilin sigur einki meira. Lítið man vera at ivast í at seðlarnir sipa til staðarnøvnini ið eru nevnd her frammanfyri.

Felagsheiti í norskum

Í norskum finna vit kvennkynsorðið *hardgreip*, og í *Norsk ordbok* IV (2002) er tað lýst sum '1) (handv.) tvinge nytta når ein skal fella og lima saman trestykke. 2) stytte med lita kluft i enden til å stø stakkstauren med' (*stakkstaur* er ein 3-4 m høg stong sum stendur upp ígjøgnum sátu ella des, og sum henda er gjørd rundanum). Týdningurin er við øðrum orðum amboð sum spennir okkurt fast ella heldur onkrum føstum. Eg havi ikki frætt um at tað kemur fyri í norskum staðarnøvnum tó at eg havi spurt meg fyri.

Sernavn og felagsheiti í íslendskum

Í íslendskum kemur *harðgreip* harafturímóti fyri báði sum felagsheiti og sum sernavn. Upplýsingar sum eg havi fingið úr Örnefnastofnun Íslands, vísa at *Harðgreip* er at finna sum staðarnavn í tveimum støðum á Eysturlandinum, á Fáskrúðsfirði og Mjóafirði.

Í eini lýsing frá 1841 av prestagjaldinum Kolfreyjustaður verður sagt at *Harðgreip* er navnið á einum lítlum vági, "og sýnir nafnið að lending er þar ei ljúffellileg," t.e. at har er illa lendandi. Tað merkiliga er kortini at í yngri staðarnavnauppskrift hjá tí íslendska staðarnavnasavninum er staðið nevnt *Harðgleypuvogur* ella *Harðgreypuvogur* (tað fyrra er sagt at vera tað vanligara). Her síggja vit at tað staðlýsandi -*vogur* 'vágur' er skoytt upp í navnið (epexegetiskt uppískoyti), at fyrra lið sær út til at hava fingið veikt snið (t.e. *greipa* el. *gleipa* fyri *greip – ei* og *ey* ljóða eins í íslendskum), og at ljóðbroytingin *r* > *l* eisini kann henda her, men at hon her rakar tað seinra *r*'ið í *Harðgreip*.

Staðið á Mjóafirði er lýst soleiðis: "Skammt utan við Árbásinn er dálítið klapparnef og í skúti, með gati upp í gegnum klöppina. Þar gýs upp brimstrókur, þegar svo stendur á sjó, og nefnist gat þetta Harðgreip." (Örnefnaskrá Hofs í Mjóafirði). Her er *Harðgreip* sagt at vera navn á

holi í helluni sum sjógvur sprænir uppígjøgnum, sbr. *sprutthol* á føroyskum.

Annars hevur íslendskt mál kvennkynsorðið *harðgreip* (við síðuforminum *harðgleipa*) um næstovasta hálsliðin, tann ið er undir knóranum ella hálsvølugeislanum, ella sum ÍO sigur: 'næsti liður neðan við banakringlu'. Eisini eru dømir um at merkingin í íslendskum kann vera 'klemma, knípa', sbr. hetta dømið úr *Vestfirzkum sögnum* II, 285: "ég brauzt um af öllu megni til þess að losna úr harðgreipum þessum." Her tykist merkingin vera 'einhvers konar klemma'.[2]

Fornmál

Í fornnorrønum máli kemur lýsingarorðið *harðgreipr* fyri og merkir 'som grip hardt, hardhendt (i tilnamn, jotun- og gygrenamn)' (NO). Eisini *Lexicon Poeticum* lýsir orðið á sama hátt ('med stærk, kraftig, hånd') og vísir til kvæðið Bjarkamál har tað kemur fyri sum viðurnevni hjá berserkinum *Hárr enn harðgreipi* (skrivað "Hár hiN harðgreipi", Bjarkamál en fornu, ør. 2, sí Jónsson 1967: A I: 180). Sama orðabók hevur eisini *Harðgreip* f. 'jættekvinde (egl. 'med hård hånd')' sum sernavn, og báði viðvíkjandi sernavninum og felagsheitinum verður víst til "tulur" (ramsur) har jatna- og gívranøvn eru tald (sí Jónsson, 1967, A I: 656 f. har *harðgreip* er nevnt undir "Trollkvenna heiti" og *harðgreipr* undir "Jǫtna heiti II").

Tann svenski staðarnavnafrøðingurin Jöran Sahlgren hevði í 1942 eina grein í *Namn och bygd* 30 har hann vísti á at jatnakvendi við hesum navni kemur fyri í einum svenskum staðarnavni sum í eldri keldum kann vera skrivað t.d. *Hartgrepas Lögetråg*, *Hartgrepas Löjetråg*, *Hartgröpas Löjetråg*. Tað er (ella hevur verið) navn á eini lægd í lendinum, 33 m long, 19 m breið og 1 m djúp. Fyrra lið, fornsvenskt *Hardhgrepa* (norr. *Harðgreipa*), skal hava verið navnið á gívrini. Orðið *lögetråg* el. *löjetråg* merkir 'vaskitrog', og søgnin er at Harðgreipa skal hava brúkt lægdina sum baðikar at vaska børnum sínum í. Sahlgren vísir á at á einum gomlum korti (frá 1691) finst navnið skrivað *Gunnelgrepias barns logetrogh*. Navnið *Gunnelgreipa* skal setast í samband við frásagnir í Smálandi um ein *Gunnar Gröpa*. Hetta navnið tolkar Sahlgren sum upprunaligt *Gunn Hardhgrepa*, t.e. gívurin hevur hitið *Gunn* og havt viðurnevnið *Hardhgrepa*.

Niðurstøða

Her á landi kemur *Harðgreip(a)* ella *Halgreip* einans fyri sum staðarnavn. Tað er navn á innangarðsjørð, á traðarstykki og á lendi við trimum homrum úti í óbygdum. Tað at tað kemur fyri sum staðarnavn í Føroyum, og tað so víða um landið, vísir at orðið hevur verið livandi orð í føroyskum onkuntíð í tíðini. Verri er at siga í hvørjum týdningi tað hevur verið brúkt. Sambandið við *hørg* (sbr. Nielsen 1990) kunnu vit síggja burtur frá. Eingin ivi er um at tað má setast í samband við orðið og nøvnini í norrønum, íslendskum, norskum og svenskum, ja, at tað er sama orðið í ymiskari nýtslu. Men tað er ikki lætt at síggja nakað merkingarligt samband millum tað norrøna og svenska gívraheitið, ta norsku amboðsmerkingina, tað íslendska heitið á

[2] Eg takki Svavari Sigmundssyni fyri upplýsingar úr íslendskum.

einum hálsgeisla og tey føroysku staðarnøvnini.

Plássið í Ørðavík segðist vera "trølsligt" og bar orð fyri at vera íbygt, og freistandi kundi tí verið at sett tað í samband við ta norrønu og svensku nýtsluna sum trøllkonuheiti. Heldur ikki er gott at vita um tað íslendska sprutthólið við navninum *Harðgreip* í Mjóafirði kann hava verið sett í samband við trøllkonu. Men vit sóu eisini at *hitt* íslendska navnið varð sett í samband við torfør lendingarviðurskiftir. Og so er tað týdningurin 'klemma' ella 'knípa' sum vit sóu dømi um av Vestfjørðum í Íslandi, og ikki so langt frá honum er tann norski týdningurin 'tvinga, skrúvuklombur, t.e. amboð at spenna okkurt saman við'. Kanska eru vit her heldur ikki so fjart frá upprunatýdninginum sum nevndur er í norrønum orðabókum ('við harðari hond'). Innangarðsjørðin Halgreip í Bø var sum vit hoyrdu sera brøtt og full av gróti og man hava verið ring at fáa góðan bø burturúr. Traðarstykkið Harðgreipa í Tjørnuvík er ein lítil brattur teigur innikleimdur millum geil, á og hellusvað. Varðagøtan hjá fámjiningum lá um Harðgreipur, og trølsligt skuldi vera har. Um tað í hesum navni fjalir seg okkurt gamalt minni um gívrar, er kanska nakað djarvt at halda, men ikki er gott at vita.

Søvn:

Handrit til Taxatiónsprotokoll og Skjøde- og Panteregister, Føroya Landsskjalasavn.

Staðarnavnasavnið á Føroyamálsdeildini, Fróðskaparsetri Føroya.

Örnefnastofnun Íslands, Háskóla Íslands.

www.kortal.fo
www.sunda.fo

Bókmentir:

FO = *Føroysk orðabók*. Tórshavn 1998: Føroya Fróðskaparfelag.

Føroyar. Topografiskt kort 1:20.000. København 1987-1998: Kort og Matrikelstyrelsen.

ÍO = *Íslensk orðabók*. 4. útg. Reykjavík 2007: Edda.

Jónsson, Finnur: *Den norsk-islandske skjaldedigtning* A I-II. København 1967 (1912-1915): Rosenkilde og Bagger.

Lexicon Poeticum. Ordbog over det norsk-islandske skjaldesprog. 2. udg. København 1966 (1931): Atlas Bogtryk.

Matras, Chr. 1933: *Stednavne paa de færøske Norðuroyar*. Kjøbenhavn.

Mikkjalsbók. Savnað og skipað hava Jákup R. Hansen og Heini F. Petersen. Tórshavn 1994: Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Nielsen, Niels Jacob. 1990: *Varðagøtan*. (Óprentað handrit).

NO = *Norrøn ordbok*. 5. útg. Oslo 2012: Det norske Samlaget.

Norsk ordbok IV. Oslo 2002: Det norske Samlaget.

Sahlgren, Jöran. 1942: Gunnar Gröpa en jättekäring. *Namn och bygd* 30: 159-170.

Taxatiónsprotokoll 1873: *Protokol over den i Henhold til Lov angaaende en ny Skyldsætning af Jorderne paa Færøerne af 29de Marts 1867 foretagne Taxation af bemeldte Jorder*. Kjøbenhavn.

Vestfirzkar sagnir II. Reykjavík – Ísafjörður 1933-1946.

Weyhe, Eivind. 2014: Variatión av *i* og *u* í herðingarveikari støðu í føroyskum. *Fróðskaparrit* 61: 116-136.